# Misskiljing kostaði Esmari bronsuna

**Klokkan ringdi fyri seinasta umfari, men tað var ikki fyri Esmari, og tí bleiv tað bert til eitt 6. pláss hjá honum.
Næsta umfar av Grand Prix súkklukappingini bleiv koyrt á Eystanstevnu í Runavík í vikuskiftinum. Vaksin og børn kappaðust, tó luttók eingin genta hesaferð.**

**Súkkling**
*Tíðindaskriv:*

Orsøkin til misskiljingina hjá Esmari Joensen var, at klokkan ringdi fyri vinnaranum, Gunnari Dahl-Olsen, sum tá var í hølunum hjá bólkinum sum Esmar Joensen var í.

Súkklararnir kappaðust í Grand Prix-kappingini leygardagin í býarkoyring. Í býarkoyring veður kappsúkkla runt eitt avmarkað øki, vanliga í 45 minuttir pluss eitt umfar, men hesa ferð bleiv koyrt í 30 minuttir pluss eitt umfar. Koyrt varð á keiøkinum við timburhandilin í Runavík. Børnini súkklaðu sama somu leið, tey ynsktu súkklaðu leiðina tríggjar ferðir, meðan dreingir 12 til 14 ár súkklaðu leiðina fýra ferðir.

Tá helvtin av tíðini var farin í kappingini hjá vaksnu monnunum, stakk favuritturin Gunnar Dahl-Olsen av og fekk beinanvegin lagt avstand millum seg og restina av súkklarunum. Eli royndi at koyra hann inn aftur, men fekk ikki hjálp frá nøkrum og tí var sigurin hjá Gunnari tryggjaður longu tá. Eli fekk sum sagt onga »hjálp«, men fekk eisini lagt avstand millum seg og súkklufeltið aftanfyri seg, hann vann eitt sera trygt silvurheiðursmerki, Eli hevur nú 68 stig samanlagt. Eftir misskiljingina hjá Esmari Joensen stakk Sverri Mohr Edvinsson avstað við bronsuni.

Eli Christiansen stendur seg væl innan súkkling og er hann avgjørt tann sterkasti av unglingunum í Føroyum.

### Spennandi hjá teimum yngru

Enn eitt súkklutalent aftrat er komið undan kavi. Tað er 14 ára gamli klaksvíkingurin, Hans Krosstein, ið aftur hesa ferð fór við sigrinum. Hann er sterkur og er eisini ein góður sprintari. Hann fekk góða kapping frá Bergur Johansen av Argjum, men sigurin hjá Hans var tó tryggur. Hann vann við umleið einum hálvum minutti.

Hjá teimum yngstu fór Rani G. Jacobsen við sigrinum. Hann fekk tó harða kapping frá Niels Christiansen, ið leingi lá á odda. Men á seinast umfari fór Rani framum og koyrdi nær um allan umgangin einsimallur. Hann vann ein tryggan sigur. Verri gekk hjá Niels Christiansen. Hann lá sum sagt væl fyri, men í seinasta svinginum var hann óheppin og gleið, tí fekk hann bert eitt sjenda pláss í kappingini. Nummar tvey gjørdist vinnarin frá Norðoyastevnu, Reidar Luid. Nummar trý bleiv Finnur Mellemgaard. Vinnararnir fingu heiðursmerkir og allir luttakarar og hjálparfólk fingu sodavatn frá Føroya Bjór, ið er ein góður stuðul hjá Tórshavnar Súkklufelag.

Úrslit frá Grand Prix súkklingini á Eystanstevnu:

**Menn:**

| Nr. | Navn | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Gunnar Dahl-Olsen | 40 |
| 2 | Eli Christiansen | 34 |
| 3 | Sverri M. Edvinsson | 30 |
| 4 | Beinir Rasmussen | 26 |
| 5 | Kári Simonsen | 23 |
| 6 | Esmar Joensen | 20 |
| 7 | Jens Sigurð Simonsen | 18 |
| 8 | Christian Guttesen | Givin |

**Unglingar:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Dánjal Michealsen | 40 |

**Dreingir, 12 til 14 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Hans Krosstein | 40 |
| 2 | Bergur Johansen | 34 |
| 3 | Rúni Bláfoss | 30 |
| 4 | Torkil Weyhe | 26 |

Dreingir, 9 til 11 ár:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Rani G. Jacobsen | 40 |
| 2 | Reidar Luid | 34 |
| 3 | Finnur Mellemgaard | 30 |
| 4 | Atli Carlsson | 26 |
| 5 | Magnus Sørensen | 23 |
| 6 | Kaj Johannesen | 20 |
| 7 | Niels Christiansen | 18 |

## FM-støðan

**5-mannfør dreingir**

| | bátur | stig hesaferð | stig íalt |
|---|---|---|---|
| 1 | Fípan Fagra | 7 | 14 |
| 2 | Blikur | 5 | 9 |
| 3 | Tjaldrið | 3 | 8 |
| 4 | Havfrúgvin | 4 | 5 |
| 5 | Drekin | 2 | 4 |
| 6 | Sílið | 0 | 3 |
| 7 | Ørnin | 1 | 1 |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 7 | 14 |
| 2 | Páll Fangi | 5 | 10 |
| 3 | Riddarin | 4 | 8 |
| 4 | Gongurólvur | 3 | 6 |
| 5 | Víkingur | 1 | 3 |
| 6 | Hvessingur | 2 | 2 |
| 7 | Lómur | 0 | 1 |

**5-mannafør, gentur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Sílið | 7 | 14 |
| 2 | Ørnin | 5 | 9 |
| 3 | Fípan Fagra | 4 | 9 |
| 4 | Blikur | 3 | 6 |
| 5 | Drekin | 2 | 3 |
| 6 | Havfrúgvin | 1 | 3 |

**6-mannafør, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Smyril | 7 | 12 |
| 2 | Páll Fangi | 5 | 12 |
| 3 | Hvessingur | 4 | 8 |
| 4 | Gongurólvur | 3 | 6 |
| 5 | Strálan | 2 | 3 |
| 6 | Sølmundur | 1 | 3 |

**8-mannafør**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 7 | 12 |
| 2 | Argjabáturin | 5 | 12 |
| 3 | Knørrur | 4 | 8 |
| 4 | Húsavíkingur | 2 | 5 |
| 5 | Nevið Reyða | 3 | 3 |
| 6 | Kvívíksbáturin | 1 | 3 |

**10-mannafør**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 7 | 14 |
| 2 | Klaksvíkingur | 5 | 9 |
| 3 | Havnarbáturin | 3 | 8 |
| 4 | Vestmenningur | 4 | 7 |
| 5 | Nólsoyingur | 2 | 4 |

# Andstøðan: Løgmaður misbrúkar valdið
# Løgmaður: Eg geri bara mína skyldu

**POLITIKKUR**
*Jan Müller*

Tann drúgva samráðingarmánaðan eftir valið varð frá fleiri síðum funnist harðliga at framferðini hjá Anfinni Kallsberg, løgmanni. Tað varð sagt, at tað var fullkomiliga upp til hansara privata »forgottbefinnandi« at avgera, hvør skuldi samráðast, hvussu longi samráðast skuldi, hvør niðurstøða skuldi gerast, og hvør skuldi blakast út og hvør takast inn. Víst varð á, at gamaní var hetta ein leiklutur hann hevði heimild til eftir stýrisskipanarlógini, men soleiðis sum hann útinti henda leiklut, var tað ein ljót viðferð av demokratiskum spælireglum og undir øllum umstøðum í stríð við vanligu uppfatanina fólk hava av demokratisku hugsjónini. Framferðin hjá løgmanni avdúkaði eitt ódemokratiskt lýti við stýrisskipanarlógini: at løgmaður bara bleiv sitandi við maktini, sjálvt um hann og hansara samgonga høvdu tapt valið.

Anfinnur Kallsberg er á ongan hátt samdur í hesum skoðsmáli:

-Hatta svari eg dundrandi nei til. Tí vit høvdu eina stýrisskipan frammanundan, sum segði, at eftir eitt val skuldi nýtt landsstýri skipast, nýggjur løgmaður og eitt nýtt landsstýri veljast. Ta skipanina fór man frá í 1994 og varð ein onnur skipan sett í verk, sum sigur, at eftir eitt val situr ein samgonga, til hon fær ein meiriluta ímóti sær. Tað varð gjørt fyri at fylgja tí parlamentarisku skipan, sum er galdandi aðrastaðni og sum eitur negativ parlamentarisma, tvs. at tú situr, til tú fær ein meiriluta ímóti tær.

-Tað eg gjørdi eftir valið, sigur løgmaður víðari, var at spyrja allar flokkar, um eg skuldi royna at finna eitt parlamentariskt grundarlag ella um eg skuldi fara til løgtingsformannin. Tað var eingin flokkur, sum boðaði frá, at eg skuldi fara til løgtingsformannin. Tí helt eg tað var mín skylda sum løgmaður at royna at fáa eina nýggja samgongu, sum hevði eitt samt parlamentariskt bakland aftanfyri seg. At tað tók longri tíð enn tað átti, komst m.a. av, at hinir flokkarnir vildu nakað annað enn eg, men allir sóu sær ein møguleika at vera við.

Løgmaður heldur tað tí vera órættvís at kalla seg ódemokratiska og vilja misbrúka valdið, tá hann hevði fingið tað signalið frá øllum flokkum: tá var tað hansara skylda at royna tað, og tað varð tað hann gjørdi.

Løgmaður vísir á, at um henda samgongan ikki kom upp at standa, so hevði hann biðið um at verða loystur úr starvi.

Anfinnur Kallsberg ivast onga løtu í, hóast lemjandi atfinningar frá øðrum flokkum, at hann hevur borið seg demokratiskt og rætt at. -Eg havi bara gjørt tað, sum allir flokkar hava álagt mær at gera. Hvørki meira ella minni.

**Lesið eisini síðurnar: 14, 16, 17, 18 og 19**



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Mentamáladeildin** er deild í trivnaðarfyrisitingini og hevur umsitingina av tí partinum av føroysku skúlalóggávuni, ið við lógum um fólkaskúla, frítíðarundirvísing og øðrum skúlalógum eru lagdar út til kommununa.

Deildin hevur um hendi menta- og skúlamál, ítróttarmál og studningar.

Mentamáladeildin leggur til rættis og avgreiðir øll mál, sum verða løgd fyri mentamálanevndina.

Harumframt skipar deildin fyri hátíðarhaldi av ymiskum slag m.a., tá ið árligu heiðurslønirnar verða latnar. Skipar fyri listaframsýningum í Snarskivuni.

www.torshavn.fo

**Málsviðgeri til mentamáladeildina**

**Nakrar høvuðsuppgávur eru:**
- málsviðgerð
- fundarfrásagnir
- at skipa fyri og hava fundir um menta- og skúlamál
- at samskifta við fólkaskúlarnar, musikkskúlan, kvøldskúlan, býarbókasavnið, kunningarstovuna, svimjihøllina, stadionøkið, ítróttarfeløgini og onnur feløg og einstaklingar, sum arbeiða við mentamálum
- projektarbeiði í sambandi við mentanarálitið
- arbeiði í sambandi við nýggju fólkaskúlalógina
- skrivari í gøtunavnanevndini

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving, teldukunnleika, duga føroyskt til lítar og kunna samskifta á enskum.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at umsøkjarin er áhugaður í mentanarøkinum, dugir væl at leggja til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast gjørligt. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við nógvum fjølbroyttum og mennandi uppgávum, har tú arbeiðir sjálvstøðugt og hevur møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, deildarleiðara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 25. juli 2002.







www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

KOM OG DANSA Í PLATFORM
MÁNAKVØLDIÐ TANN 24. JUNI

Katrin Dahl Christiansen og Mia Cameron leggja lag á við m.a. hip hop og Line dans

Tiltakið verður fyri bæði gentur og dreingir frá 13 - 17 ár

*kl. 19.30 - 21.30*

Royk- og rúsfrítt sjálvandi

Sodavatn og Sunkist verður eisini at fáa til keyps

KOSTNAÐURIN: 40,-

Við Pluss Korti frá Føroya Sparikassa verður kostnaðurin kr. 25,-

Foreldrabólkurin: Sólrún 210780 · Tone 251165 · Lise 260334

Tøkk til tykkum, sum stukku inn á gólvið, sendi blómur og heilsanir á 75 ára degi blaðsins 24. mai í ár

Sosialurin